# Vikuskifti

Nr. 91 • hósdagur • 11. - 14. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

Da Vinci leikstórin í mótvindi:

# – Ron Howard vil ikki boyggja seg fyri kirkjuni

**Herfyri kom fram at Katólska Kirkjan í mánaðir hevur roynt at fáa Sony til at skriva á filmin um The da Vinci Code, at hann er fiktión og ikki veruleiki. Nú hevur Ron Howard, ið er ein av teimum stóru mainstream leikstjórunum og tungu dreingjunum í Hollywood, fingið nóg mikið. Hann heldur ikki, at filmarnir hjá honum skulu noyðast, at prenta sum tekst, um teir byggja á veruleikan ella ikki**

DAVINCI CODE
*Kim Simonsen*

Tað er katólski felagsskapurin Opus Dei, ið hevur roynt at sett trýst á framleiðarnar av filminum. Opus Dei er veruliga í andglettinum í bókini um da Vinci gátuna, har felagsskapurin við øllum midlum berjist ímóti sannleikanum, sum leitað verður eftir.

Seinast vit sóu Ron Howard var í filminum "Cinderella Man" ið er søgan um ein boksara og sterka kærleikan millum konuna Mae og James, og hvussu tey lærdu at halda enn meiri saman tá tíðirnar eru ringar. Áðrenn hetta eisini filmin "A Beautifull Mind".

Ron Howard hevur sakt við Los Angeles Times, at hansara filmar eru fiktión, um fólk, ið eru ávirkað av samansvørjingartonkum og ástøði. Hetta er ikki gudfrøði ella søga, men ein spenningsfilmur.

**Søgan er blasfemisk**

Vatikanið hevur leingið kalla søguna hjá Dan Brown blasfemiska. Serliga felagsskapurin Opus Dei, verður lagdur undir mistanka í bókini.

The da Vinci Code fær heimspremieru á filmstevnuni í Cannes 17. mai og kring allan heimin 19. mai., men ikki í Havnar Bio, tí eigarin er samdur við Pávanum um at søgan er blasfemisk.

## FAKTA

Søgan byrjar við at professarin Robert Langdon (Tom Hanks) verður biðin um at koma til

Louvre í Paris, har eitt av starvsfólkunum er myrt, eftir eru nógv ymisk spor og symbol.

Langdon, og kotubrótarin Sophie Neveu (Audrey Tautou), finna so við og við, eina røð av ótrúligum loyndarmálum í verkunum hjá multiflogvitinum Leonardo da Vinci, ið aftur vísa aftur til eitt loyndarmál, ið hevur verið dult í 2000 ár. Ferðin gongur gjøgnum Paris, London og Skotland, har tey finna spor og royna at bróta kotuna, ið skal geva okkum eina vitan um grundarlagið undir okkara mentan, trúgv og søgu.



*Dan Brown hevur selt 25 millionir eintøk av bókini The Da Vinci Code, og er hon týdd til 44 mál kring allan heimin*

**Australska kirkjan rasandi**

Eisini í Australia eru kirkjufólk óð inn á The da Vinci Code filmin. Hesi hava gjørt eina 20 sekund langa video, ið skal vísa øllum, at Dan Brown bert lýgur, Millum annað um at Jesus hevði eftirkomarar. Við at brúka somu midlar sum filmídnaðurin vónar Enska Kirkjan í Australia, at hon kann loypa á tað sum Dan Brown hevur sakt.





BILUR OG AVGJØLD ÍROKNAÐ

## BILPAKKI TIL NOREGS

Njótið frælsið, ið kemst av at ferðast í egnum bili. Farið til Noregs. Pakkið bilin í túninum, koyrið umborð, hugnið tykkum á ferðini og farið so frísk og væl hvíld í land. Tykkum nýtist heldur ikki at stúra fyri, at okkurt liggur eftir – hvørki á út- ella heimferð. Við Smyril Line fáa tit alt við.

**RING 34 59 00 OG HOYR NÆRRI**

**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen ella hinvegin í 4 koyggjukamari við WC/bað (uttan vindeyga) fyri 4 fólk og 1 persónbil. Øll avgjøld eru íroknað.

11.05 og 14.09 - 05.10
**Fyri hvønn úr bert 528,-**

17.05 - 19.06 og 14.08 - 07.09
**Fyri hvønn úr bert 799,-**

26.06 - 07.08
**Fyri hvønn úr bert 995,-**